# Genturnar hjá VB fingið heiðursmerkir

**VB gentur 12 — 14 ár hava staðið seg væl í ár og hava bæði silvur og bronsu um hálsin**

ÍTRÓTTUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tað gongur væl í yngru deildunum hjá VB og formaðurin, John Henrik Holm, fegnast um, at tilfar er í ungdómsdeildunum, so til ber at seta við og harvið ber til at hava bjartar framtíðarvónir..

Drongjaliðið er meistari 3. ár á rað, men eisini genturnar 12 — 14 ár hjá VB hava klárað seg væl og hava ikki minni enn tvey heiðursmerkir hangandi um hálsin. Tær hava vunnið silvur í steypakappingini og bronsu í Føroyameistarakappingini.

Eisini gentuliðið varð heiðrað á samkomu í VB húsinum leygardagin, eftir dystin millum drongirnar hjá VB og HB, har VB drongirnir fingu gull og steyp til ognar.

Venjari hjá VB gentunum hevur verið Marner Ludvig.



*VB gentur 12 — 14 ár hava staðið seg væl í ár og hava bæði silvur og bronsu um hálsin*
*Mynd: D. Olsen*

# Eiga framvegis fyrsta sigurin til góða

**Partick Thistle, sum aftur hesa ferð hevði Jákup Mikkelsen á beinkinum, megnaði ikki at varðveita leiðsluna og er framvegis aftast**

SKOTLAND
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Eftir sjúkraleguna var Jákup Mikkelsen á beinkinum hjá Partick Thistle, tá ið teir leygardagin vóru á graslíkisvøllinum í Dunfirmline. Úrslitið var 2–1 heimasigur, og tað ber við sær, at Partick Thistle framvegis eigur fyrsta sigurin í hesum kappingarárinum til góða. Teir eru aftast við tveimum stigum, og tað eru tvey stig fram til Aberdeen og trý stig fram til Dundee United. Hesi bæði liðini hava bara vunnið eina ferð í ár. Í báðum førunum hevur tað verið ímóti Partick Thistle.

Gerry Collins, Partick Thistle venjarin, var ikki blíður eftir dystarenda. Hann helt heilt lítið um, at liðið hjá honum hevði verið partur í uppgerð á graslíki, sum nógva regnið ikki gjørdi tað lættari at spæla á.

– Ímyndi tykkum hvat Wenger og Fergueson høvdu sagt, um Arsenal ella Manchester United hevði verið bjóðað graslíki at spæla á, gav Partick Thistle venjarin, sum ivaleyst man kenna seg eitt sindur kroystan, ilt av sær.

Fyrra umfarið kom einki mál. Fimm minuttir eftir hvíldina legði James Grady Partick Thistle framum. So setti heimaliðið eitt sindur meiri ferð á, og tað eydnaðist teimum at fáa tvey mál. Í báðum førunum var tað skotski landsliðsspælarin, Stevie Crawford, sum var meistari fyri málunum, og í báðum førunum var tað úr stuttari fjarstøðu, at hann skoraði.

Hetta var fyrsti sigurin hjá Dunfirmline á nýggja graslíkinum. Sigurin kundi havt verið uppaftur trivaligari. Eina ferð sendu teir í stólpan, og eina aðra ferðina varð málið kolldømt fyri rangstøðu.

Kenny Arthur var í málinum hjá Partick Thistle, og sambært skotsku bløðini átti hann ikki lut í málunum, og hann verður róstur fyri at hava havt onkra góða bjarging.

Dunfirmline er á fjórða plássi. Enn sum áður eru tað Glasgow feløgini Rangers og Celtic, sum stríðast um oddasessin. Partick Thistle er eitt av smáu feløgunum í Glasgow, og tað ber ikki til at siga annað, enn at støðutalvan boðar frá, at felagið hjá Jákupi Mikkelsen rættuliga er í skugganum av stóru feløgunum. Nú Jákup er komin fyri seg eftir sjúkraleguna fæst at síggja, um Gerry Collins fer at seta hann aftur í málið og harvið at lata hann koma úr skugganum á Kenny Arthur.

# VB drongirnir fingu gullið



*Drongjaliðið hjá VB er meistari 3. ár á rað og fekk leygardagin gullheiðurmerkir og steyp til ognar*
*Mynd: D. Olsen*

**Leygardagin leiktu drongjaliðið hjá VB ímóti drongjunum úr HB. Úrslitið var 2- 2, men longu framman undan var greitt, at VB drongirnir høvdu tryggjað sær gullið 3. árið á rað og harvið fingu teir eisini steyp til ognar**

ÍTRÓTTUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Gullrómur var á Eiðinum í Vági leygardagin, tá drongjaliðið hjá VB fekk gullheiðurmerkir handaði og steyp til ognar, tí teir 3. árið á rað eru meistarar.

VB drongirnir leiktu ímóti drongjunum hjá HB leygardagin og úrslitið var javnleikur 2 — 2. Heiðursmerkjahandan var eftir dystin og fingu VB drongirnir gull og HB fekk silvur fyri annað pláss.

Óli Holm handaði vegna Fótbóltssambandið steyp og sum fyrrverandi formaður í VB fegnaðist hann sjálvsagt um, at steypið nú verður latið VB til ognar.

Eftir dystin var fýrverk og myndatøka og síðani móttøka í VB húsinum, fyri at heiðra drongirnar hjá VB. Fagnaður var í VB húsinum við gávum, m.a. frá Vágs Kommunu, ið eisini handaði steyp, og røður vórðu hildnar og gullrómur var í VB húsinum.

Eisini genturnar hjá VB 12 — 14 ár hava megnað at fáa heiðursmerkir í ár og tær áttu eisini pláss í veitsluhaldinum leygardagin, sum endaði við gulldansi leygarkvøldið.

Venjarar hjá drongjunum hava verið Ingi Hansen og John Christensen.

# TMS tapti

**Heini Hanusarson og liðfelagarnir fingu beinin so ruddiliga niður á jørðina, tá teir um vikuskiftið máttu lúta fyri Fredericia**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir flotta avrikið móti Skjern fyri viku síðani, gjørdist tað um vikuskiftið aftur gerandisdagur hjá Heina Hanusarson og liðfeløgum hansara í Team Midtsjælland.

Hesa ferð leiktu teir móti Fredericia, og tað var sjáldan nakar spenningur um, hvat liðið var betri. Í hálvleikinum var støðan 17-14 til heimaliðið, og í seinna hálvleiki øktist munurin bara. Heini og teir funnu í góða løtu ikki fram til málið, og tá avtornaði, stóðu 33-25 á máltalvuni, sum sostatt boðaði frá einum tryggum heimasigri.

**Danska TDC-ligan**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GOG | 3 | 3 - 0 - 0 | 94 | 54 | 23 | 6 |
| 2 | AaB | 3 | 3 - 0 - 0 | 90 | 67 | 19 | 6 |
| 3 | KIF | 3 | 3 - 0 - 0 | 96 | 86 | 6 | 6 |
| 4 | Bjerringbro | 3 | 3 - 0 - 0 | 84 | 66 | -16 | 6 |
| 5 | Årshus GF | 3 | 2 - 0 - 1 | 108 | 90 | 23 | 4 |
| 6 | Fredericia | 3 | 2 - 0 - 1 | 78 | 87 | 9 | 4 |
| 7 | FCK | 3 | 1 - 0 - 2 | 74 | 73 | 9 | 2 |
| 8 | Silkeb.-Voel | 3 | 1 - 0 - 2 | 71 | 81 | 9 | 2 |
| 9 | TMS | 3 | 1 - 0 - 2 | 67 | 80 | 9 | 2 |
| 10 | Skjern | 2 | 1 - 0 - 1 | 53 | 49 | 6 | 2 |
| 11 | Ajax | 3 | 0 - 0 - 3 | 77 | 89 | 9 | 0 |
| 12 | Helsinge | 3 | 0 - 0 - 3 | 74 | 96 | 9 | 0 |
| 13 | Otterup | 3 | 0 - 0 - 3 | 66 | 104 | 9 | 0 |
| 14 | Tvis | 2 | 0 - 0 - 2 | 50 | 60 | 9 | 0 |

Føroyskir leikarar: Heini Hanusarson (TMS)




**Heimarøktin og Serforsorgin**

## Sosialráðgevi

### til Stuðulsfólkaskipanina fyri vaksin

Eitt starv sum sosialráðgevi á Stuðulsfólkaskipanini fyri vaksin, undir Heimarøktini og Serforsorgini, verður hervið lýst leyst til setan sum skjótast ella eftir nærri avtalu.

Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin fevnir um stuðul til 60 heimabúgvandi brúkarar, svarandi til 42 fulltíðarstørv.

**Starvsuppgávur**
- At ráðgeva og vegleiða
- Samskipa stuðulin, tá fleiri stovnar eru inni í myndini
- Viðgera nýggjar umsóknir
- Ráðgeva feløg og stovnar
- Endurmeta ta hjálp, sum er veitt einum brúkara

**Vit søkja eftir einum starvsfólkið ið:**
- Hevur vitan og royndir innan sosiala øki
- Hevur áhuga at arbeiða við brekaðum
- Dugir at skapa positivt og virðiligt samband við brúkaran
- Dugir at arbeiða skipað og miðvíst
- Dámar at arbeiða bæði sjálvstøðugt og tvørfakliga
- Er sálarliga væl fyri og dámar avbjóðingar
- Er uppfinningarsamur og dugir at umstilla seg skjótt

**Vit bjóða**
- Eitt mennandi arbeiði, har nógv er at gera
- Eitt arbeiðsumhvørvi har pláss er fyri látri
- Vegleiðing og ráðgeving

**Setanar- og lønarviðurskifti:**
Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Heimarøktina og Serforsorgina. Tænastustaðurin í løtuni er Stuðulsfólkaskipanin.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Stuðulsfólkaskipanina á tlf. 354020 og tosa við Regin Johansen, virkandi leiðara ella við virkandi socialráðgevi Oda M. Jóhansdóttir. Viðmerkjast skal at skikkaður umsøkjari er til starvið.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn, við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:

Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin
Att.: Regin Johansen, virkandi leiðari
Niels Finsensgøta 28, 2. hædd
FO-100 Tórshavn

Umsóknarfreist: 14 oktober 2003



## Grót fæst

við at koma eftir tí.

**Tlf. 216600 ella 215609**







**Miðvágs-Sandavágs kvøldskúli**



## Miðvágs-Sandavágs kvøldskúli

### Veturin 2003/2004

**Hesi tilboð verða í Miðvágs-Sandavágs kvøldskúla í vetur:**

| LÆRUGREIN | LÆRARI | TÍÐ | TILMELDING |
|---|---|---|---|
| Ítróttur/Boccia | ÍSB-lærari | eftir avtalu | 332820/221432 |
| Fimleikur | Hervør Jørgensen | mán./hós. kl. 18.30 | 333204 |
| Føroyskt fyri útlendingar | Hjalmar P. Petersen | eftir avtalu | 332451 |
| Føroysk rættskriving | Thurid Olsen | mikukvøld kl. 19 | 332820/221432 |
| Handarbeiði | Ruth Myllhamar | mánakvøld kl. 19 | 333399 |
| Klaverundirvísing | Martin Pollard | mánakvøld kl. 18 | 333537/213537 |
| Klænkiskeið | Marjun í Kálvalíð | hóskvøld kl. 18 og 19.40 | 332779 |
| Kórsangur | Ólavur Hátún | mánakvøld kl. 19.30 | 311819 |
| Ungdómsorkestur | Steven Foggin | hóskvøld kl. 16.30 | 333362/254945 |
| Teldulæra Framhaldsskeið *) | Marianna Simonsen og Árni Frederiksen | mikukvøld kl. 19.30 | 332416/332968 |
| Teldulæra Byrjunarskeið **) | Marianna og Árni | hóskvøld kl. 19.30 | 332416/332968 |
| Enskt (munl./skr.) | Petur Pólsson | mánakvøld kl. 19 | 333337 |
| Veving | Poulina Jensen | fríggjakvøld kl.18 | 322344/212344 |
| WHF/SRC | Sámal J. Jørgensen | eftir avtalu | 332549 |
| Træsmíð | Sjúrður Guttesen | hóskvøld kl. 19 | 332447/255639 |

**Luttøkugjaldið, sum skal gjaldast fyrsta kvøldið, er:**

300 kr fyri hvørja lærugrein.
Undantikið hesi reglu er skeiðið í veving, tað kostar 400 kr.

*) Telduskeiðið mikukvøld er fyri tey, sum hava nomið sær eitt sindur av kunnleika.
**) Teldukeiðið hóskvøld er fyri tey, sum lítlan og ongan kunnleika hava.

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari undirtøku og góðkenning myndugleikanna. Byrjað verður eftir avtalu.


www.sosialurin.fo